# Grannskoðaraeftirlitið

## Ársfrágreiðing

2011

## 1. Inngangur

Sambært kunngerð nr. 4 frá 13. januar 2009, um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið § 13, skal Grannskoðaraeftirlitið gera eina árliga frágreiðing um virksemi sítt. Í frágreiðingini skal úrslitið frá góðskueftirlitinum umrøðast. Úrslitini kunnu almannakunngerðast í hagfrøðiligum líki uttan at tilskila, hvørji grannskoðaravirkini eru.

Hetta er onnur ársfrágreiðingin hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

Grannskoðaraeftirlitið hevur gjørt umfatandi eftirlit í 2011. Tilsamans hava 11 grannskoðaravirkir fingið góðskueftirlit. Talan er um 3 løggild grannskoðaravirkir og 8 skrásett grannskoðaravirkir.

Grannskoðaraeftirlitið hevur tikið støðu til, at eftirlitið hjá 7 virkjum, er endað uttan fleiri viðmerkingar. 4 grannskoðaravirkir hava fingið fráboða nýtt eftirlit í 2013.

Grannskoðaraeftirlitið/Skráseting Føroya hevur gjørt avtalu við danska Erhvervs og Selskabsstyrelsen/Revisortilsynet um at nýta donsk góðskueftirlitsfólk at gera eftirlit í Føroyum. Til góðskueftirlitið í 2011 vórðu donsk eftirlits fólk nýtt.

Í 2011 vórðu 6 fundir hildnir í Grannskoðaraeftirlitinum. Harafturat vóru fleiri fundir hildnir í arbeiðsbólkinum at fyrireika eftirlit í 2011. Somuleiðis vóru fundir hildnir við donsku eftirlitsfólkini áðrenn hesi fóru á eftirlit.

Grannskoðaraeftirlitið kallaði alla grannskoðaravinnuna á fund á várið 2011. Endamálið við fundinum var at kunna um eftirlitið 2011.

## 2. Lógargrundarlag

Við árslok 2011 var løggávan á grannskoðarøkinum henda:

- Løgtingslóg nr. 45. frá 11. mai 2009 um løggildar og skrásettar grannskoðarar

  og:

- Kunngerð nr. 92 frá 6. september 2010 um grannskoðaravirksemi
- Kunngerð nr. 67 frá 7. juni 2010 um grannskoðaraváttanir v.m.
- Kunngerð nr. 6 frá 17. februar 2010 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins
- Kunngerð nr. 5 frá 17. februar 2010 um óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirkisins
- Kunngerð nr. 151 frá 3. desember 2009 um kravda eftirútbúgving fyri góðkendar grannskoðarar
- Kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini

- Kunngerð nr. 5 frá 14. januar 2009 um trygd og ábyrgdartrygging fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar
- Kunngerð nr. 4 frá 13. januar 2009 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið
- Kunngerð nr. 3 frá 13. januar 2009 um Dissiplinernevnd fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar
- Kunngerð nr. 25 frá 6. apríl 2011 um skrá yvir løggildar og skrásettar grannskoðarar
- Kunngerð nr. 117 frá 18. desember 2008 um próvtøku til at gerast løggildur ella skrásettur grannskoðari

## 3. Virksemið hjá Grannskoðaraeftiritinum

Virksemi hjá Grannskoðaraeftirlitinum er ásett í § 32 – 39 í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar og løggildar grannskoðarar (grannskoðaralógin).

Starvskipan hjá Grannskoðaraeftirlitinum er ásett í kunngerð nr. 4 frá 13. januar 2009 um starvskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið.

Uppgávan hjá Grannskoðaraeftirlitinum er at tryggja, at góðskueftirlitið, sambært § 27 í grannskoðaralógini, fer fram í samsvari við lógarinnar reglur.

Góðskueftirlitið fevnir um eina meting av góðskustýringarskipanini og um arbeiðið og óheftnið í sambandi við tær uppgávur, sum grannskoðarin fremur.

Góðskueftirlitið skal fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Góðskueftirlitið skal tó fara fram við í mesta lagi 3 ára millumbilum í grannskoðaravirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá virkjum, sum § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini fevnir um.

Eitt grannskoðaravirki, har góðskueftirlit fer fram, skal geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal síggja til, at Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fær tær upplýsingar og ta hjálp, ið verða mett neyðug fyri at fremja góðskueftirlitið. Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðaravirkinum, hava samsvarandi skyldu mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og eftirlitsfólkinum.

Tá góðskueftirlitið er endað, ger góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing, ið verður send Grannskoðaraeftirlitinum. Frágreiðingin skal innihalda eina lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini og eina meting av úrslitinum av kanningini.

Grannskoðaraeftirlitið kann krevja tær upplýsingar frá grannskoðaraeftirlitsfólkunum og tí, sum verður kannaður, ið eru neyðugar fyri, at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar.

Grannskoðaraeftirlitð tekur støðu til, um eftirlitið hjá tí kannaða gevur høvi til
1) At eftirlitið verður endað uttan fleiri viðmerkingar,
2) Átalu uttan onnur tiltøk innan næstu vanligu eftirlitsvitjan ella
3) Átalu við eftirlitsvitjan, ið skal vísa, um viðurskiftini eru komin í rættlag.

Grannskoðaraeftirlitið tekur eisini støðu til, um komið er fram á skeivleikar ella manglar hjá teimum kannaðu, sum geva orsøk til at leggja málið fyri grannskoðaranevndina.

Manning av Grannskoðaraeftirlitinum í 2011:

Rannvá Sólheim, forkvinna
Jógvan Amonsson, umboð fyri løggildar grannskoðarar
Bjarni Arnason, umboð fyri løggildar grannskoðarar
Hermund Jacobsen, umboð fyri skrásettar grannskoðarar
Marion á Lakjuni, umboð fyri skrásettar grannskoðarar
Sólfrið Hansen, umboð fyri roknskaparbrúkarar
Nina Djurhuus, umboð fyri roknskaparbrúkarar
Eyðna Justinussen, umboð fyri roknskaparbrúkarar
Malan Johansen, umboð fyri roknskaparbrúkarar

Skráseting Føroya er skrivstova hjá grannskoðaraeftirlitinum. Kitty May Ellefsen er skrivari hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

## 4. Góðskueftirlit 2011

Í sambandi við góðskueftirlitið 2011 eru leiðreglur, fyri fremjan av góðskueftirliti og kunning um hetta, gjørdar. Leiðreglurnar vórðu lagdar á heimasíðuna hjá Skráseting Føroya í februar 2011. Leiðreglurnar lýsa neyvt hvussu eftirlit skal fara fram. Sí www.skraseting.fo

Talan hevur verið um eitt sokallað "tænastueftirlit" av føroysku grannskoðaravirkjunum í 2011. At talan hevur verið um tænastueftirlit merkir, at Grannskoðaraeftirlitið, áðrenn eftirlitið fór fram, tók avgerð um, at einki mál skal leggjast fyri Grannskoðaranevndina í 2011, uttan í teimum førum har eitt grannskoðaravirki ikki hevur nakra góðskustýringsskipan og ikki hevur í umbúna at fáa slíka.

Grundarlagið fyri hesari avgerð er, at eftirlitsskipanin er nýggj fyri føroysku grannskoðararnar. Og samstundis sum nýggjastu leiðreglurnar í Danmark verða nýttar sum grundarlag fyri eftirlitinum so er tænastueftirlitið at rokna sum ein yvirgangsskipan har føroyskir grannskoðarar fara frá ongum almennum eftirlitið

til fult eftirlit, sum tó ikki hevur tær avleiðingarnar, sum eitt vanligt fult eftirlit kundi havt.

Viðmerkjast skal, at danir hava havt nógv ár, at venja seg til eftirlits skipanina. Hetta tí, at leiðreglurnar so við og við eru "uppgraderaðar" í Danmark. Í Føroyum hevur Grannskoðaraeftirlitið tikið útgangsstøði í donsku leiðreglunum fyri 2010.

Tíðliga í 2011 tók Grannskoðaraeftirlitið støðu til, at øll føroysk grannskoðaravirkir skuldu fáa bjóða eftirlit. Grannskoðaravirkini fingu boð um hetta innan tann 1. mars 2011, sambært § 5 í kunngerð nr. 6. frá 17. februar um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirsins.

<u>Góðskueftirlitsfólk</u>
Sum áður greitt frá, hevur Skráseting Føroya/Grannskoðaraeftirlitið gjørt avtalu við Erhvervs og Selskabsstyrelsen/Revisortilsynet um at brúka donsk skrásett eftirlitsfólk.

Tíðliga í 2011 fekk Grannskoðaraeftirlitið listan við skráset donsk eftirlitsfólk frá danska Revisortilsynet. Hereftir vóru valdir grannskoðarar frá 2 grannskoðaravirkjum, at gera eftirlitið í Føroyum. Eitt til § 19 stk. 3 grannskoðaravirkir og eitt til hini virkini.

Sambært § 7 í kunngerðini um eftirlit skal góðskueftirlitsfólkið hava boð um, hvørji grannskoðaravirkir viðkomandi er valdur at kannaí árinum. Hetta var eisini gjørt, bæði fyri § 19 stk. 3 virkir og eisini fyri hini. Í samband við fráboðan av løggildu grannskoðaravirkinum boðaði eftirlitsfólkið frá, at tað ikki hevði gegni, at fremja eftirlit hjá tí eina løggilda grannskoðaravirkinum. Tí danska grannskoðaravirkið, har danska eftirlitsfólkið starvast, og føroyska løggilda grannskoðaravirkið samarbeiða í sama grannskoðaranetverki. Í hesum sambandi tók Grannskoðaraeftirlitið avgerð um, at útseta eftirlit av hesum eina grannskoðaravirkinum til annað eftirlitsfólk varð funnið.

Góðskueftirlitsfólkini hava gjørt avtalu við Grannskoðaraeftirlitið fyri hvørt góðskueftirlit, sum hesi vóru biðin um at gera. Í avtaluni er støddin á grannskoðaravirkinum, tali av grannskoðarum, tali av skrivstovum, umsetningur og tali av viðskiftafólki staðfest. Avtalan fevnir eisini um vavi og innihaldið á góðskueftirlitinum, herundir støddina á stakkanningunum. Eisini fevndi avtalan um, ætlaða tímatal og tímatakst, sum eftirlitsfólki hevði heimild at nýta í sambandi við eftirlitið.

<u>Kanningarnar í 2011</u>
Í sambandi við góðskueftirlitið 2011 hevur góðskueftirlitsfólki serliga kanna hesi viðurskifti:

1) At grannskoðaravirkið hevur tær neyðugu góðskustýrisskipanirnar. Somuleiðis er kannað um góðskustýrisskipanirnar hjá virkinum standa mát við góðan góðskustýrissið, og eru nøktandi í mun til ta støðd og eyðkenni, sum grannskoðaravirkið hevur.

2) At grannskoðaravirkið hevur reglur um, hvussu óheftni hjá grannskoðaranum verður stýrt sum heild og í sambandi við ta einstøku uppgávuna.
3) At uppgávurnar verða framdar í samsvari við góðan grannskoðarasið, undir hesum teimum í Føroyum nýttu grannskoðanarstandardum, og at hetta kann prógvast.

4) Um grannskoðarar hava verið ígjøgnum ta kravdu eftirútbúgvingina sambært § 4 í grannskoðaralógini.

Góðskueftirlitið skal, umframt at kanna tær vanliga nýttu mannagongdirnar í grannskoðaravirkinum, eisini við stakroyndum gjøgnumganga ítøkuligar grannskoðanar- og váttanaruppgávur. Stakroyndir av ítøkuligum grannskoðanar- og váttanaruppgávum vóru gjørdar á øllum grannskoðaravirkjum har eftirlit var framt.

Tá eftirlitið varð liðugt sendi eftirlitsfólkið eina váttan til Grannskoðaraeftirlitið. Fyri tey grannskoðaravirkir, sum eru fevnd av § 19 stk. 3 í grannskoðaralógini hevur eftirlitsfólki lati Grannskoðaraeftirlitinum eina frágreiðing yvir góðskueftirlitið, sambært § 21 í kunngerðini um eftirlit.

## 5. Niðurstøða frá góðskueftirlitinum

Grannskoðaraeftirlitið hevur á tveimum fundum viðgjørt váttanir og frágreiðingar frá eftirlitsfólkunum. Úrslitið av hesum fundum hevur verið, at 7 grannskoðaravirkir hava fingið fráboðan um, at eftirlitið er endað uttan fleiri viðmerkingar, vísandi til § 33, stk. 5, nr. 1 í grannskoðaralógini.

4 grannskoðaravirkir hava fingið boð um, at í frágreiðingini frá góðskueftirlitsfólkunum eru viðurskifti, sum gera, at Grannskoðaraeftirlitið, sambært § 33 stk. 5, nr. 3 í grannskoðaralógini, hevur tikið avgerð um, at uppfylgjandi eftirlit verður á heysti í 2013.

## 6. Framtíð

Í 2012 verður Grannskoðaraeftirlitið skorðið niður í helvt soleiðis, at eftirlitið verður skipað við 1 formanni, 1 løggildum grannskoðara, 1 skrásettum og 2 roknskaparbrúkarum. Tó vera varalimir í nevndini. Broytingin kemur í gildi tann 1. juni 2012.

1 grannskoðaravirki skal hava eftirlit í 2012.

Samtykt á fundi 29. mai 2012:

| | | |
|---|---|---|
| Rannvá Sólheim, forkvinna | Jógvan Amonsson | Bjarni Arnason |
| Hermund Jacobsen | Marion á Lakjuni | Eydna Justinussen |
| Nina Djurhuus | Malan Johansen | Sólfríð Hansen |

**Skjal 1**

**Brot úr Grannskoðaralógini**

*Grannskoðaraeftirlitið*

**§ 32.** Skráseting Føroya setir eitt grannskoðaraeftirlit. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri eftirlitið. Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 8 aðrar limir. 2 limir skulu vera løggildir grannskoðarar, 2 skulu vera skrásettir grannskoðarar, og 4 skulu umboða roknskaparbrúkararnar. Hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar kunnu vera góðkendir grannskoðarar ella vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum.

*Stk. 2.* Formaðurin í Grannskoðaraeftirlitinum og limirnir verða tilnevndir av Skráseting Føroya fyri eitt tíðarskeið upp til 4 ár.

*Stk. 3.* Grannskoðaraeftirlitið skal tryggja, at góðskueftirlitið sambært § 27 fer fram í samsvari við lógarinnar reglur. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um góðskueftirlitið, og um hvussu tað skal fara fram. Landsstýrismaðurin kann heruppií áseta serligar reglur um góðskueftirlitið í grannskoðanarvirkjum, ið fremja grannskoðan í virkjum, sum eru nevnd í § 19, stk. 3.

*Stk. 4.* Tær í stk. 3 nevndu reglur um fremjing av góðskueftirliti skulu m.a. hava leiðreglur um,

1) hvør kann fremja eftirlitið,
2) val av góðskueftirlitsfólkum, sbr. § 33,
3) val av grannskoðanarvirkjum, har góðskueftirlit skal fara fram, og
4) vavið á og fremjingina av góðskueftirlitinum.

*Stk. 5.* Útreiðslurnar av góðskueftirlitinum rindar Grannskoðaraeftirlitið fyribils,,men tær skulu berast av tí grannskoðanarvirki, ið er góðskukannað. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjald fyri góðskueftirlitið.

**§ 33.** Grannskoðaraeftirlitið góðkennir teir grannskoðarar, ið fyri eitt 5 ára tíðarskeið kunnu fremja góðskueftirlit, sbr. § 32, stk. 4, nr. 1. Hesir verða nevndir góðskueftirlitsfólk. Eftirlitið førir ein lista yvir góðskueftirlitsfólkini. Skráseting Føroya kann í ítøkiligum førum tilnevna onnur enn grannskoðarar sum góðskueftirlitsfólk. Góðskueftirlitsfólk skulu hava hóskandi yrkisútbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu og hava neyðugan kunnleika til góðskueftirlit.

*Stk. 2.* Góðskueftirlitið skal fara fram í samsvari við tær reglur, sum eru ásettar um hetta, sbr. § 32, stk. 3 og 4.

*Stk. 3.* Tá góðskueftirlitið er endað, ger góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing, ið verður send Grannskoðaraeftirlitinum. Frágreiðingin skal innihalda eina lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini og eina meting av úrslitinum av kanningini. Ger ein grannskoðari kanningina, verður frágreiðingin gjørd sum ein váttan sambært § 1, stk. 2.

*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið kann krevja tær upplýsingar frá góðskueftirlitsfólkinum og tí, sum verður kannaður, ið eru neyðugar fyri, at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar. Grannskoðaraeftirlitið kann somuleiðis krevja tær upplýsingar frá góðskueftirlitsfólkinum, ið eru neyðugar fyri, at góðskueftirlitið kann leggja eitt mál fyri Grannskoðaranevndina. Grannskoðaraeftirlitið kann, um tað verður mett neyðugt, sjálvt gera eftirlitsvitjanir ella taka lut í eftirlitsvitjan saman við einum góðskueftirlitsfólki.

*Stk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið tekur støðu til, um eftirlitið hjá tí kannaða gevur høvi til

1) at eftirlitið verður endað uttan fleiri viðmerkingar,

2) átalu uttan onnur tiltøk innan næstu vanligu eftirlitsvitjan ella

3) átalu við eftirlitsvitjan, ið skal vísa, um viðurskiftini eru komin í rættlag.

*Stk. 6.* Grannskoðaraeftirlitið tekur eisini støðu til, um komið er fram á skeivleikar ella manglar hjá teimum kannaðu, sum geva orsøk til at leggja málið fyri Grannskoðaranevndina, sbr. § 41.

*Stk. 7.* Grannskoðaraeftirlitið gevur út eina árliga frágreiðing um arbeiðið hjá eftirlitinum.

*Stk. 8.* Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalu við donsku myndugleikarnar um, at tað í § 27 nevnda góðskueftirlit verður framt av góðskueftirltisfólki, sum danska Revisortilsynet hevur góðkent sambært lov om godkendte revisorer og revisionsvirksomheder (revisorloven), og at góðskueftirlitsfólkini fremja eftirlitið við ábyrgd og undir eftirliti av danska Revisortilsynet, og at tey virki, ið verða vald út til eftirlit, verða vald út eftir tilmæli frá danska Revisortilsynet.

*Stk. 9.* Góðskueftirlitsfólk sambært stk. 8, hava tær heimildir, sum ásettar eru í hesi lóg og reglum, settar sambært lógini.

*Stk. 10.* Verður avtala gjørd sambært stk. 8 hevur landsstýrismaðurin heimild til í kunngerð at gera frávik frá §§ 33 og 34.

**§ 34.** Limirnir í Grannskoðaraeftirlitinum, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum eru við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, koma undir reglurnar um óheftni grannskoðarans, sbr. § 22.

*Stk. 2.* §§ 152, 152 a og 152 c-152 f í revsilógini eru galdandi fyri limir í Grannskoðaraeftirlitinum, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum eru við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, viðvíkjandi upplýsingum um fíggjarligu, vinnuligu ella privatu viðurskiftini hjá einum likamligum ella løgfrøðiligum persóni, sum teir verða kunnugir við í sambandi við sítt arbeiði.

*Stk. 3.* Hóast ásetingarnar í §§ 152-152 e í revsilógini, kunnu góðskueftirlitsfólkini lata víðari upplýsingar til Grannskoðaraeftirlitið, eins og Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkini kunnu lata víðari upplýsingar til Grannskoðaranevndina.

*Stk. 4.* Hóast ásetingarnar í stk. 2, kunnu Grannskoðaraeftirlitið, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum hava verið við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, lata víðari upplýsingar til Skráseting Føroya sambært § 30, stk. 3.

**Skjal 2:**

**Kunngerð nr. 6 frá 17. februar 2010 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins**

Við heimild í § 32, stk. 3 og 5, § 33, stk. 10 og § 51, stk. 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir verður ásett:

**Kapittul 1**
**Nýtsluøki**

**§ 1.** Henda kunngerð er galdandi fyri góðskueftirlit sambært § 27 og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins sambært §§ 32-34 í grannskoðaralógini.

**Kapittul 2**
**Hvussu grannskoðanarvirkir og góðskueftirlitsfólk verða vald**

**§ 2.** Granskoðaraeftirlitið skal skipa góðskueftirlitið soleiðis, at øll grannskoðanarvirkir verða kannað, sbr. § 13, stk. 1 í grannskoðaralógini, við í mesta lagi 6 ára millumbili. Grannskoðaraeftirlitið skal tó gerast við í mesta lagi 3 ára millumbili á grannskoðanarvirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá virkjum, fevnd av § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini.

*Stk. 2.* Eitt grannskoðanarvirki, sum ikki veitir váttanir sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini, og váttar hetta við trú og heiður yvirfyri Skráseting Føroya innan tann 31. desember á hvørjum ári, er undantikið grannskoðaraeftirliti uttan so, at Grannskoðaraeftirlitið tekur aðra avgerð.

**§ 3.** Grannskoðaraeftirlitið kann av sínum eintingum ella eftir áheitan frá grannskoðanarvirkjum, ið eru partur av einum netverki, sbr. § 7, stk. 3 í kunngerðini um óheftni grannskoðarans og grannskoðaravirkisins, avgera, at øll ella nøkur av hesum virkjum verða útvald til góðskueftirlit í sama ári.

*Stk. 2.* Um eitt grannskoðanarvirki, sum er valt út til góðskueftirlit, hevur onnur grannskoðanarvirkir í sínum eigaraskara, sbr. § 13 í grannskoðaralógini, kann Grannskoðaraeftirlitið av sínum eintingum ella eftir áheitan avgera, at hesi grannskoðanarvirkir verða útvald til góðskueftirlit í sama ári.

**§ 4.** Grannskoðaraeftirlitið kann avgera, at eitt grannskoðanarvirki skal veljast út til eyka ella meira tíðugt eftirlit, um eftirlitið metir, at umstøður eru, sum geva orsøk til hetta. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.

*Stk. 2.* Grannskoðaraeftirlitið kann eftir áheitan frá Skráseting Føroya velja eitt grannskoðanarvirki út til eyka eftirlit. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.

**§ 5.** Grannskoðanarvirkir, sum eru úttikin til góðskueftirlit, fáa boð í seinasta lagi tann 1. mars um, at tey í hesum árinum skulu undir góðskueftirlit.

*Stk. 2.* Grannskoðanarvirkið og grannskoðarar knýttir at virkinum skulu geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum atgongd til at gera tær kanningar, ið verða mettar neyðugar, og skulu síggja til, at eftirlitið og góðskueftirlitsfólkini fáa tær

upplýsingar og ta hjálp, sum verður mett neyðug fyri at fremja góðskueftirlitið, sbr. § 27, stk. 4 í grannskoðaralógini.

**§ 6.** Grannskoðaraeftirlitið boðar grannskoðanarvirkinum frá, hvørji góðskueftirlitsfólk eru vald at fremja góðskueftirlit á virkinum. Hetta skal helst vera fráboðað virkinum innan tann 1. apríl.
*Stk. 2.* Hevur grannskoðanarvirkið eitt grundað mótmæli móti tí valda góðskueftirlitsfólkinum, skal grannskoðanarvirkið boða Grannskoðaraeftirlitinum frá hesum í seinasta lagi 14 dagar eftir, at virkið hevur fingið fráboðanina sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Um viðurskifti eru, sum hava við sær, at góðskueftirlitsfólkið ikki kann fremja eftirlit á grannskoðanarvirkinum velur Grannskoðaraeftirlitið eitt annað góðskueftirlitsfólk.

**§ 7.** Góðskueftirlitsfólkið fær boð um, hvørji grannskoðanarvirkir viðkomandi er valdur at fremja eftirlit á í tí árinum. Hetta skal helst vera fráboðað innan tann 1. apríl.
*Stk. 2.* Grannskoðaraeftirlitið hevur ikki skyldu til at býta málini javnt millum eftirlitsfólkini, eins og eftirlitið ikki kann veita vissu fyri einum minsta tali av málum ella at øll eftirlitsfólkini fáa mál til viðgerðar.
*Stk. 3.* Eftirlitisfólkið skal meta um, hvørt óheftni hjá viðkomandi er hótt sambært kapittul 4 í grannskoðaralógini og reglum ásettar við heimild í hesum, og meta um, hvørt viðkomandi hevur teir neyðugu yrkisligu førleikarnir í mun til grannskoðanarvirkið, sum góðskueftirlitsfólkið skal kanna. Um óheftni hjá eftirlitsfólkinum er hótt ella eftirlitsfólkið ikki hevur tann neyðuga yrkisliga førleikan, skal eftirlitsfólkið boða Grannskoðaraeftirlitinum frá hesum innan 14 dagar eftir valið sambært stk. 1.
*Stk. 4.* Um góðskueftirlitsfólkið seinni staðfestir, at viðkomandi ikki er óheftur ella annars ikki lýkur treytirnar fyri at fremja góðskueftirlitið, skal eftirlitsfólkið beinanvegin geva eftirlitinum og grannskoðanarvirkinum skrivlig boð um hetta. Eftirlitið velur síðani ein nýtt eftirlitsfólk at fremja góðskueftirlitið á grannskoðanarvirkinum. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.

**§ 8.** Skráseting Føroya kann í ítøkiligum førum velja aðrar persónar til góðskueftirlitsfólk enn tey, sum Grannskoðaraeftirlitið ella danska Revisortilsynet hevur góðkent, sbr. § 33 í grannskoðaralógini. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya kann lata Grannskoðaraeftirlitið gera avtalur eftir §§ 10-13 við eitt góðskueftirlitsfólk, sum er valt sambært stk. 1.

**§ 9.** Tá Grannskoðaraeftirlitið metur tað neyðugt, kann eftirlitið sjálvt fara á eftirlitsvitjanir ella luttaka í einari eftirlitsvitjan saman við einum góðskueftirlitsfólki.
*Stk. 2.* Tá Grannskoðaraeftirlitið metur tað neyðugt, kann eftirlitið velja meiri enn eitt eftirlitsfólk til at fremja góðskueftirlitið á einum ávísum grannskoðanarvirki ella í einum netverki.

## Kapittul 3
## Avtala um at fremja góðskueftirlit

**§ 10.** Góðskueftirlitsfólkið ger eina avtalu við Grannskoðaraeftirlitið fyri hvørt góðskueftirlitið, sum eftirlitsfólkið er biðið um at gera. Í avtaluni skal í minsta lagi standa:

1) Støddin á grannskoðanarvirkinum, ið skal góðskukannast, undir hesum talið av grannskoðarum, ið vátta eitthvørt við trygd, talið av skrivstovum og støddina á hesum, umframt umsetning og talið av viðskiftafólkum, sum biðja um váttanir eftir § 1, stk. 2 í

grannskoðaralógini,

2) innihaldið og vavið av góðskueftirlitinum, undir hesum væntaðu støddina á stakkanningunum,
3) hvør er ætlaður at gera góðskueftirlitið,
4) væntaða tímatalið (fyri hvønn luttakara),
5) serlig viðurskifti, ið hava týdning fyri okkurt av omanfyrinevndu viðurskiftum.

*Stk. 2.* Tá eitt góðskueftirlitsfólk er útnevnt, skal viðkomandi skjótast gjørligt seta seg í samband við grannskoðanarvirkið, sum skal góðskukannast, fyri at fáa greiðu á teimum í stk. 1 nevndu upplýsingum.

*Stk. 3.* Góðskueftirlitsfólkið fyllir út og undirskrivar avtaluna. Í seinasta lagi 14 dagar eftir, at góðskueftirlitsfólkið er útnevnt sendir viðkomandi avtaluna til Grannskoðaraeftirlitið, sum góðkennir og undirskrivar avtaluna.

**§ 11.** Grannskoðanarvirkið, sum skal góðskukannast, váttar, at grannskoðanarvirkið aktivt virkar fyri, at góðskueftirlitið kann verða framt.

**§ 12.** Tá Grannskoðaraeftirlitið hevur undirskrivað avtaluna, gevur eftirlitið góðskueftirlitsfólkinum og grannskoðanarvirkinum, sum skulu góðskukannast, boð um hetta.

*Stk. 2.* Um umstøður eru, ið hava við sær, at Grannskoðaraeftirlitið ikki fær gjørt avtaluna ella seinni má uppsiga avtaluna velur Góðskueftirlitið eitt nýtt eftirlitsfólk til at gera góðskueftirlitið. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.

**§ 13.** Grannskoðaraeftirlitið ger mannagongdir fyri snið og innihald í avtaluni.

## Kapittul 4
## Góðskueftirlitsfólkini

**§ 14.** Grannskoðaraeftirlitið ger listar yvir góðkend góðskueftirlitsfólk, sum eru góðkend at gera góðskueftirlit á:

1) Grannskoðanarvirkjum, har meirilutin av atkvøðunum er ogn hjá løggildum grannskoðarum
2) Grannskoðanarvirkjum, har meirilutin av atkvøðunum eru ogn hjá løggildum grannskoðarum, og sum grannskoða roknskapir hjá virkjum sum ásett í § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini.
3) Grannskoðanarvirkir, har meirilutin av atkvøðunum eru ogn hjá skrásettum grannskoðarum
4) Grannskoðanarvirkir, har meirilutin av atkvøðunum eru ogn hjá skrásettum grannskoðarum og sum grannskoða roknskapir hjá virkjum sum ásett § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini.

*Stk. 2.* Fyri onnur grannskoðanarvirkir enn tey, sum eru fevnd av stk. 1, nr. 1-4 velur Grannskoðaraeftirlitið eitt eftirlitsfólk, sum hevur tann neyðuga yrkisliga førleikan at gera uppgávuna.

*Stk. 3.* Grannskoðaraeftirlitið kann velja eitt góðskueftirlitsfólk frá einum øðrum lista enn tí

listanum, ið fevnir um tað slagið av grannskoðanarvirki.

*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið kann velja góðskueftirlitsfólk frá listum, sum danska Revisortilsynet hevur gjørt yvir góðkend góðskueftirlitsfólk sambært lov om godkendte revisorer og revisionsvirksomheder, sbr. § 33, stk. 8 í grannskoðaralógini.

Góðskueftirlitsfólkini fremja eftirlitið við ábyrgd og undir eftirliti av Grannskoðaraeftirlitinum.

*Stk. 5.* Listarnir eru alment atkomuligir á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya - www.skraseting.fo.

**§ 15.** Ein góðkendur grannskoðari, ið ynskir at gerast góðskueftirlitsfólk, skal søkja Grannskoðaraeftirlitið um hetta.

*Stk. 2.* Góðkenning sum góðskueftirlitsfólk, kunnu grannskoðarar fáa, sum

1) eru skrásettir í Grannskoðaraskrásetingini,
2) hava luttikið á einum skeiði, sbr. § 16,
3) ikki innanfyri tey seinastu 5 árini í Grannskoðaranevndini er dømdur ávaring ella bót fyri brot á skyldurnar sambært grannskoðaralógini, ella er skrásettur í Det Centrale Kriminalregister og Grannskoðaraeftirlitið metur, at hetta hevur týdning fyri arbeiðið sum góðskueftirlitsfólk,
4) ikki hevur eitt mál til viðgerðar í Grannskoðaranevndini, sum Grannskoðaraeftirlitið metur hava týdning fyri arbeiðið sum góðskueftirlitsfólk,
5) ikki starvast í einum grannskoðanarvirki, sum Grannskoðaraeftirlitið í sambandi við seinasta endaða góðskueftirlit á virkinum, hevur álagt eitt nýtt góðskueftirlit, og
6) hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði, og í hesum sambandi givið váttanir sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini í minst 3 ár innanfyri tey seinastu 5 árini.

*Stk. 3.* Fyri at fáa góðkenning sum góðskueftirlitsfólk á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskapir hjá virkjum sum ásett í § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini, skal grannskoðarin umframt at uppfylla krøvini í § 15, stk. 2, nr. 1-6, hava váttað roknskapir sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini hjá virkjum sum ásett í § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini í minsta lagið í 3 ár innan fyri tey seinastu 5 árini.

*Stk. 4.* Um umsóknin sambært stk. 1 verður góðkend, setur Grannskoðaraeftirlitið viðkomandi á listan sambært § 14 fyri inniverandi ár og tey fylgjandi fýra álmanakkaárini, sbr. § 33, stk. 1 í grannskoðaralógini. Tíðarskeiðið kann verða longt.

**§ 16.** Eitt skeið eftir § 15, stk. 2, nr. 2, skal hava ein almennan part um góðskutrygd og góðskustýring og ein serligan part um, hvussu góðskueftirlitið verður gjørt.

*Stk. 2.* Serstakliga skal dentur leggjast á

1) Góðskutrygdarskipanir á grannskoðanarvirkjum.
2) Frágreiðing grannskoðarans.
3) Arbeiðsmannagongdir og veitan av váttanum, herundir grannskoðarastandardir.
4) Reglurnar í grannskoðaralógini um óheftni og um eigarviðurskifti.
5) Krøvini til førleikar og tilfeingi grannskoðarans.
6) Reglurnar í grannskoðaralógini um grannskoðaraeftirlit.

7) Krøvini til skjalprógvan fyri arbeiði grannskoðarans.
8) Uppgávurnar hjá Grannskoðaraeftirlitinum.
9) Leiklutur og ábyrgd hjá eftirlitsfólkinum.
10) Hvussu góðskueftirlitið verður gjørt - gongdin frá tí at eftirlitsfólkið verður valt og til frágreiðingin er liðug.
11) Neyv frágreiðing um og dømir um einstøku liðirnir í málsgongdini.

*Stk. 3.* Grannskoðaraeftirlitið kann halda skeiðini sambært stk. 2, ella lata uttanhýsis útbjóðara halda skeiðini. Uttanhýsis útbjóðarar skulu hava skrivliga góðkenning frá eftirlitinum viðvíkjandi tí ætlaða skeiðsinnihaldinum, áðrenn skeiðið byrjar.

**§ 17.** Góðskueftirlitisfólkini, sum standa á listanum sambært § 14 skulu taka lut á einum árligum skeiði við samsvarandi innihaldi sum ásett í § 16, og harumframt á einum fundi við Grannskoðaraeftirlitið, ið m.a. hevur til endamál at savna royndirnar frá teimum framdu góðskueftirlitunum, og gera eftirlitsfólkini varug við serligar spurningar. Vantandi luttøka hevur við sær, at góðskueftirlitisfólkið ikki sleppur at gera eftirlit.
*Stk. 2.* Grannskoðaraeftirlitið kann avgera, at luttøka á árliga skeiðinum og fundinum við eftirlitið ikki er neyðug.

**§ 18.** Eitt góðskueftirlitisfólk kann til eina og hvørja tíð biðja um at verða strikað av listanum sambært § 14, tó kann hetta í fyrsta lagi verða, tá ið góðskueftirlitisfólkið hevur fullfíggjað eftirlitsuppgávur, sum viðkomandi longu hevur átikið sær. Grannskoðaraeftirlitið kann tó taka aðra avgerð.
*Stk. 2.* Um eitt góðskueftirlitisfólk orsakað av sjúku ella øðrum serligum umstøðum verður forðað í at gera eina eftirlitsuppgávu, sum viðkomandi hevur átikið sær, skal hetta skjótast gjørligt verða fráboðað Grannskoðaraeftirlitinum og grannskoðanarvirkinum. Eftirlitið tekur støðu til, um góðskueftirlitið kann útsetast til árið eftir, ella eftirlitið skal gerast, og eitt nýtt góðskueftirlitsfólk verður valt til uppgávuna. Í slíkum føri kann verða vikið frá §§ 5-7 og § 22, stk. 1.
*Stk. 3.* Eftirlitsfólk hava skyldu til beinanvegin at boða Grannskoðaraeftirlitinum frá, um Grannskoðaranevndin dømir eftirlitsfólkið at fáa eina ávaring ella bót, ella viðkomandi verður skrásettur í Det Centrale Kriminalregister fyri brot á skyldurnar sambært grannskoðaralógini. Eftirlitið tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til, um eftirlitsfólkið skal strikast av listanum sambært § 14, stk. 1.

## Kapittul 5
## Innihaldið í og fremjan av góðskueftirlitinum

**§ 19.** Áðrenn góðskueftirlitsfólkið byrjar góðskueftirlitið, skal viðkomandi

1) fráboða virkinum, hvørjar upplýsingar frammanundan skulu vera um virkið, sum skal undir eftirlit,
2) gjøgnumganga tær upplýsingar áðrenn eftirlitsvitjanina, ið eru móttiknar sambært nr. 1, og
3) leggja góðskueftirlitsuppgávuna til rættis.

**§ 20.** Í sambandi við góðskueftirlitið skal eftirlitsfólkið serliga kanna,

1) at grannskoðanarvirkið hevur tær neyðugu góðskustýrisskipanirnar
2) at góðskustýrisskipanirnar hjá virkinum standa mát við góðan góðskustýrissið, og eru nøktandi í mun til ta støðd og eyðkenni, sum grannskoðanarvirkið hevur,
3) at virkið hevur eitt dagført eigara- og limayvirlit sambært § 4 í kunngerð nr. 118 frá 18. desember 2008 um grannskoðaravirksemi, og at ásetingarnar um eigaraviðurskifti í § 13, stk. 2-5 í grannskoðaralógini eru hildnar,
4) at grannskoðanarvirkið hevur reglur um, hvussu óheftni hjá grannskoðaranum verður stýrt sum heild og í sambandi við ta einstøku uppgávuna,
5) at grannskoðanarvirkið prógvar, at reglurnar um óheftni í kapittul 4 í grannskoðaralógini og reglum settar í gildi við heimild í hesum kapittli eru hildnar,
6) at uppgávur sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini verða framdar í samsvari við góðan grannskoðarasið, undir hesum teimum í Føroyum nýttu grannskoðanarstandardum, og at hetta kann prógvast,
7) støddina á tilfeingisnýtsluni,
8) samsýningarnar í mun til váttanaruppgávuna,
9) um grannskoðarar knýttir at grannskoðanarvirkinum hava verið ígjøgnum ta kravdu eftirútbúgvingina sambært § 4 í grannskoðaralógini og reglum settar í gildi við heimild í hesi grein, og
10) at virkið hevur gjørt nóg góðar skrivligar innanhýsis reglur um løgváttan frá viðskiftafólki, fráboðan til skrivstovuna fyri hvítvask (Skráseting Føroya) v.m. fyri at fyribyrgja og forða fyri at viðskiftafólk eru við til at hvítvaska og fíggja yvirgangsvirksemi, sbr. § 1, stk. 1 nr. 7 og § 3, stk. 1 í Ll.nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sbr. § 25, stk. 1 í Anordning nr. 626 frá 27. juni 2008 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme.

*Stk. 2.* Góðskueftirlitið, sbr. stk. 1, skal, umframt at kanna tær vanliga nýttu mannagongdirnar í grannskoðanarvirkinum, eisini við stakroyndum gjøgnumganga ítøkiligar grannskoðanar- og váttanaruppgávur. Stakroyndirnar av ítøkiligum grannskoðanar- og váttanaruppgávum skulu veljast út við støði í eini váðameting og útfrá slagi og vavi av virkseminum á grannskoðanarvirkinum.

*Stk. 3.* Um eitt grannskoðanarvirki, ið verður góðskukannað, hevur onnur grannskoðanarvirkir í sínum eigaraskara, sbr. § 13 í grannskoðaralógini, skal góðskueftirlitsfólkið í sambandi við góðskueftirlitið ansa eftir, um viðurskifti kunnu vera á teimum grannskoðanarvirkjunum og møguligum dótturfeløgum hjá hesum, sum kunnu hava týdning fyri óheftnismetingina.

*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið ger leiðreglur fyri útinnan av góðskueftirlitinum og fyri váttan og frágreiðing til eftirlitið.

## Kapittul 6
## Framhald av eftirlitinum og frágreiðing til Grannskoðaraeftirlitið

**§ 21.** Tá eftirlitið er gjørt, skal góðskueftirlitisfólkið skjótast gjørligt gera eina váttan við avmarkaðari trygd.

*Stk. 2.* Um góðskueftirlit, ið eru framd á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða roknskapir hjá virkjum sambært § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini, skal harumframt gerast ein frágreiðing. Eftirlitið ger leiðreglur um snið og innihald í frágreiðingini.

*Stk. 3.* Um góðskueftirlit, sum Grannskoðaraeftirlitið sjálvt hevur gjørt, sbr. § 9, verður gjørd ein frágreiðing. Góðskueftirlitsfólk, ið Skráseting Føroya hevur valt, sbr. § 8, stk. 1, gera somuleiðis eina frágreiðing.

**§ 22.** Skjótast gjørligt og í seinasta lagi tann 15. november í eftirlitsárinum sendir góðskueftirlitifólkið Grannskoðaraeftirlitinum sína váttan og møguliga frágreiðing.
*Stk. 2.* Váttanin skal lýsa, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini, og innihalda eina meting av eftirlitsúrslitinum. Góðskueftirlitsfólkið skal undir hesum greitt úttala seg um, hvørt tey í § 20 nevndu viðurskifti eru yvirhildin. Um fyrivarni ella ískoytisupplýsingar eru í váttanini, herundir uppskot um munandi ábøtur, skal hetta greitt standa í váttanini. Í váttanin skal vera ein niðurstøða, sum staðfestir, um grannskoðanarvirkið lýkur tey krøv, ið verða sett einum grannskoðanarvirki av slíkum slagi og støðd.
*Stk. 3.* Ein frágreiðing gjørd sambært § 21, stk. 2 skal eisini fevna um eina meting av innihaldinum í seinastu almannakunngjørdu frágreiðingini um gjøgnumskygni, sbr. § 25 í grannskoðaralógini.

**§ 23.** Um góðskueftirlitsfólkið metir, at góðskueftirlitið ikki kann fremjast ella er sera trupult at fremja, skal góðskueftirlitisfólkið beinanvegin boða Granskoðaraeftirlitinum frá hesum. Eftirlitið kannar málið nærri, metir um málið, og setur seg í samband við grannskoðanarvirkið, og upplýsir um tær møguligu avleiðingarnar av, at eftirlitið ikki verður gjørt.

## Kapittul 7
## Viðgerð av innlatnum frágreiðingum

**§ 24.** Grannskoðaraeftirlitið kann biðja um tær upplýsingar, tey skjøl, og ta hjálp, sum eftirlitið metir verða neyðugt fyri at fremja góðskueftirlitið, sbr. § 27, stk. 4 og § 33, stk. 4 í grannskoðaralógini.

**§ 25.** Um fyrivarni ella ískoytisupplýsingar eru í váttanini eftir § 21 skal Grannskoðaraeftirlitið taka avgerð, um

1) átala skal verða givin eftir § 33, stk. 5, nr. 2 í grannskoðaralógini,
2) átala við eftirlitsvitjan skal verða givin eftir § 33, stk. 5, nr. 3 í grannskoðaralógini,
3) málið skal leggjast fyri Grannskoðaranevndina eftir § 33, stk. 6 í grannskoðaralógini, ella
4) málið skal sendast ákæruvaldinum ella øðrum myndugleikum, og
5) grannskoðanarvirkið skal áleggjast at broyta frágreiðingina um gjøgnumskygni beinanvegin, sbr. § 22, stk. 3.

*Stk. 2.* Grannskoðaraeftirlitið gevur Skráseting Føroya fráboðan um brot, sum komið verður fram á í sambandi við eftirlit av teimum í § 20, stk. 1, nr. 3, 9 og 10 nevndu viðurskiftum
*Stk. 3.* Um grannskoðanarvirkið ikki fylgir boðunum frá Grannskoðaraeftirlitinum eftir stk. 1, nr. 5, um at broyta frágreiðingina um gjøgnumskygni beinanvegin, verður hetta fráboðað Skráseting Føroya.

## Kapittul 8
## Eftirlit Grannskoðaraeftirlitsins við góðskueftirlitsfólkunum

**§ 26.** Grannskoðaraeftirlitið skal ansa eftir, at góðskueftirlitsfólkini gera góðskueftirlitið í samsvari við grannskoðaralógina, reglum settar í gildi við heimild í grannskoðaralógini og leiðreglum, sum Grannskoðaraeftirlitið hevur gjørt sambært hesi kunngerð.

**§ 27.** Grannskoðaraeftirlitið kann krevja, at góðskueftirlitsfólkið gevur eftirlitinum síni arbeiðsskjøl, og svarar teimum spurningum, sum eftirlitið setur, og Grannskoðaraeftirlitið kann taka avgerð um at luttaka í vitjanum hjá góðskueftirlitsfólkinum ella sjálvt at fremja eftirlitið á grannskoðanarvirkjunum.

**§ 28.** Grannskoðaraeftirlitið kann strika eitt góðskueftirlitsfólk av listunum eftir § 14, um eftirlitsfólkið ikki rættstundis sendir sína váttan, frágreiðing, arbeiðsskjøl v.m., og um hetta ikki verður gjørt innan fyri eina freist, sum Grannskoðaraeftirlitið setur. Tá er § 18, stk. 2 galdandi.

*Stk. 2.* Um Grannskoðaraeftirlitið metir, at eitt góðskueftirlitsfólk hevur sett til síðis sínar skyldur kann eftirlitið, tá eftirlitsfólkið hevur havt høvi til skrivliga at koma við viðmerkingum til málið,

1) geva viðkomandi eina skrivliga átalu,
2) krevja at viðkomandi tekur eitt ella fleiri skeið, áðrenn viðkomandi kann halda fram við sínum virksemi sum góðskueftirlitsfólk, ella
3) strika viðkomandi frá listunum yvir góðskueftirlitsfólk, sbr. § 14 og harumframt avgera at
4) skjóta viðkomandi inn fyri Grannskoðaranevndina, ella
5) senda málið til ákæruvaldið.

*Stk. 3.* Um Grannskoðaraeftirlitið í sambandi við tað seinasta lokna góðskueftirlitið hevur álagt tí grannskoðanarvirkinum, sum góðskueftirlitsfólkið er í starvi á, at fara gjøgnum nýtt góðskueftirlit, kann eftirlitið avgera, at góðskueftirlitsfólkið verður strikað av listunum yvir góðskueftirlitsfólk, sbr. § 14.

## Kapittul 9
## Gjald

**§ 29.** Tá góðskueftirlitsfólkið letur Grannskoðaraeftirlitinum váttan og møguliga frágreiðing skal ein uppgerð verða latin saman við, sum vísir:

1) Ta beinleiðis nýttu tíðina fyri hvørt eftirlitsfólkið sær.
2) Ta beinleiðis nýttu tíðina og tímaløn hjá øðrum luttakarum í eftirlitsarbeiðinum.
3) Nýtt tíð til ferðing.
4) Kostnaðir eftir rokning.
5) Frágreiðing um møguligt munandi frávik í veruliga nýtta tímatalinum í mun til væntaða tímatalið, sum er ásett í avtaluni.

*Stk. 2.* Útreiðslur av beinleiðis nýttu tíðini hjá góðskueftirlitsfólkinum og øðrum luttakarum, sbr. § 29, stk. 1, nr. 1 og 2, rindar Grannskoðaraeftirlitið fyribils, men verður hon endaliga borin av tí kannaða grannskoðanarvirkinum.
*Stk. 3.* Aðrar útreiðslur eftir § 29, stk. 1, nr. 3 og 4 rindar Grannskoðaraeftirlitið fyribils, men verða tær deildar lutfalsliga millum tey grannskoðanarvirki, sum hava verið undir eftirliti í tí árinum, við støði í talinum av grannskoðarum, knýttir at grannskoðanarvirkjunum.
*Stk. 4.* Í teimum í § 9, stk. 1 nevndu førunum rindar Grannskoðaraeftirlitið útreiðslurnar av eftirlitinum. Tað sama er galdandi fyri útreiðslur til onnur eftirlitsfólk útnevnd sambært § 9, stk. 2.

**§ 30.** Grannskoðaraeftirlitið ásetur á hvørjum ári ein ella fleiri tímasatsir, sum galda fyri tey í § 14, stk. 1 nevndu góðskueftirlitsfólk.
*Stk. 2.* Um eftirlitsfólkið hevur nýtt aðrar persónar í sambandi við fremjan av eftirlitinum verður tímasatsurin hjá viðkomandi fráboðaður, sbr. § 29, stk. 1, nr. 2. Hesin tímasatsur kann ikki vera hægri enn tímasatsurin eftir stk. 1.
*Stk. 3.* Tá Skráseting Føroya sambært § 8 hevur valt annan persón til eftirlitsfólk enn eitt góðkent góðskueftirlitsfólk, rindar Grannskoðaraeftirlitið fyribils allar útreiðslurnar, men verða tær bornar av grannskoðanarvirkinum, sum hevur verið undir eftirliti.

## Kapittul 10
## Vanligar ásetingar

**§ 31.** Avgerðir, sum Grannskoðaraeftirlitið tekur eftir hesi kunngerð, kunnu ikki verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika, sbr. § 48, stk. 3 í grannskoðaralógini.

**§ 32.** Leiðreglur hjá Grannskoðaraeftirlitinum sambært hesi kunngerð, umframt listarnir yvir góðskueftirlitsfólk, eru alment atkomuligir, sbr. § 14, stk. 4.

**§ 33.** Grannskoðaraeftirlitið kann taka avgerð um, at víkja frá freistunum í § 2, stk. 2, §§ 5-7 og § 22, stk. 1.

## Kapittul 11
## Revsi- og skiftis- og gildiskomureglur

**§ 34.** Hevur eitt góðskueftirlitisfólk grovt ella ferð eftir ferð framt brot á § 7, stk. 3 ella ikki yvirhildið sínar skyldir sambært §§ 19-23, verður viðkomandi revsaður við bót.

**§ 35.** Tá ið eitt góðskueftirlitsfólk er revsað eftir § 34, skal Grannskoðaraeftirlitið strika viðkomandi av listanum eftir § 14.
*Stk. 2.* Um Grannskoðaranevndin (ella Dissiplinernevndin) hevur revsað eitt góðskueftirlitsfólk við bót fyri brot á tær skyldur, ið lógin ásetur, ella góðskueftirlitsfólkið er skrásett í Det Centrale Kriminalregister orsakað av viðurskiftum, ið verða mett at hava týdning fyri at røkja starvið sum góðskueftirlitsfólk, kann Grannskoðaraeftirlitið strika viðkomandi av listanum eftir § 14,
*Stk. 3.* Avgerð um at strika eftirlitsfólk av listanum verður fráboðað Skráseting Føroya.

**§ 36.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Skjal 3**

**Kunngerð nr. 4, frá 13. januar 2009 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið**

Við heimild í § 15, stk. 1 í løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar (grannskoðaralógin) verður ásett:

**Kapittul 1**
**Limir í og skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum**

**§ 1.** Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 8 aðrar limir. Tveir limir skulu vera løggildir grannskoðarar, 2 limir skulu vera skrásettir grannskoðarar og 4 skulu umboða roknskaparbrúkararnar. Hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar kunnu vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við løggildum ella skrásettum grannskoðara.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya tilnevnir formannin og limirnar fyri í mesta lagi eitt 4 ára tíðarskeið hvørja ferð. Limirnir kunnu verða tilnevndir aftur, tá ið hetta tíðarskeiðið er farið.

**§ 2.** Skráseting Føroya, Postboks 264, 110 Tórshavn (skr@skraseting.fo) er skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

**Kapittul 2**
**Heimildir**

**§ 3.** Grannskoðaraeftirlitið røkjur tær uppgávur viðvíkjandi góðskueftirliti við løggildum og skrásettum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, sum ásett í kapitli 9 í grannskoðaralógini.

**§ 4.** Formaðurin í Grannskoðaraeftirlitinum skipar og leiðir arbeiðið hjá eftirlitinum. Formaðurin syrgir fyri, at avgerðir hjá eftirlitinum verða almannakunngjørdar og útintar. Formaðurin undirskrivar avgerðir hjá eftirlitinum.

**Kapittul 9**
**Fundir og atkvøðureglur í Grannskoðaraeftirlitinum**

**§ 5.** Formaðurin leiðir fundirnar í Grannskoðaraeftirlitinum.
*Stk. 2.* Formaðurin ásetir fundartíð og -stað. Fundur verður annars hildin, tá 3 limir ella Skráseting Føroya setir fram ynski um fund til at viðgera nærri tilskilaðar spurningar. Einstaki limurin kann biðja um, at eitt mál verður sett á fundarskrá til fund í eftirlitinum.
*Stk. 3.* Limir verða kallaðir inn til fund við í minsta lagi 7 daga freist, uttan so at formaðurin tekur aðra avgerð.
*Stk. 4.* Saman við fundarinnkallingini skal fylgja ein fundarskrá við teimum málum, sum skulu viðgerast. Tað tilfar, ið er neyðugt fyri at viðgera málini, skal helst vera viðlagt fundarskránni.
*Stk. 5.* Mál, sum ikki eru komin á fundarskrá, kunnu verða viðgjørd á fundinum, um í minsta lagi 5 limir góðkenna tað, ella formaðurin, tá málið hevur skund, tekur avgerð um hetta.

*Stk. 6.* Skráseting Føroya kann leggja mál fyri eftirlitið. Harumframt kann Skráseting Føroya krevja, at eitt evni kemur á fundarskrá til næsta fund hjá eftirlitinum.

**§ 6.** Limir, ið ikki fáa møtt á fundi, skulu skjótast gjørligt geva skrivstovuni hjá eftirlitinum boð um hetta.

**§ 7.** Umboð fyri skrivstovuna luttekur á fundum hjá eftirlitinum.
*Stk. 2.* Formaðurin kann loyva øðrum at luttaka í ávísum málum, sum eru á skránni.

**§ 8.** Fundirnir hjá Grannskoðaraeftirlitinum eru ikki almennir.

**§ 9.** Eftirlitið er viðtøkuført, tá í minsta lagi helvtin av limunum eru til staðar undir viðgerðini av málinum.
*Stk. 2.* Eftirlitið tekur avgerð við vanligum atkvøðumeiriluta millum teir møttu limirnar. Stendur á jøvnum í atkvøðum, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.
*Stk. 3.* Tá eftirlitið viðger ávís mál, skulu umframt formannin í minsta lagi luttaka líka nógv umboð fyri roknskaparbrúkararnar sum grannskoðarar. Í málum viðvíkjandi løggildum grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum skal í minsta lagi ein løggildur grannskoðari luttaka. Í málum viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum skal í minsta lagi ein skrásettur grannskoðari luttaka.

**§ 10.** Formaðurin syrgir fyri, at samráðingar og avgerðir hjá eftirlitinum verða førdar í fundarbók.
*Stk. 2.* Í fundarbókini skal standa, hvørjir limir hava verið á fundi. Limur kann krevja sínar viðmerkingar skrivaðar í fundarbókina.
*Stk. 3.* Skrivstovan hjá eftirlitinum ger eina frásøgn frá fundum í eftirlitinum, sum eftir at hava fingið formansins góðkenning, verður send limunum. Limirnir skulu helst senda møguligar viðmerkingar til skrivstovuna, eftir at hava móttikið frásøgnina, men kunnu tó koma við viðmerkingum til frásøgnina á næstkomandi fundi.
*Stk. 4.* Limir, sum luttaka á fundi, skulu undirskriva fundarfrásøgnina.
*Stk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið kann taka avgerð um, at fundarbókin skal vera talgild, og at møguligar viðmerkingar skulu gerast talgilt, smb. stk. 1 og 2. Harumframt kann eftirlitið avgera, at fundarfrásøgnin skal sendast limunum talgilt, at limirnir gera viðmerkingar talgilt, og at frásøgnin skal góðkennast við talgildari undirskrift, smb. stk. 3 og 4.

**Kapittul 4**
**Gegni**

**§ 11.** Limirnir í Grannskoðaraeftirlitinum eru undir somu reglum um gegni sum grannskoðarar, smb. § 17, stk. 1 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Limir hava skyldu til at boða eftirlitinum frá um umstøður, ið kunnu sáa iva um gegni hjá viðkomandi.
*Stk. 3.* Limir, sum hava kunnleika til slíkar umstøður annars, hava skyldu til at boða formanninum í eftirlitinum frá hesum.
*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið avger, uttan at viðkomandi limur luttekur, um viðkomandi er ógegnigur í málinum. Ein limur kann altíð sjálvur lýsa seg sum ógegnigan, smb. stk. 1.
*Stk. 5.* Tá ein limur hevur vikið sín sess, kann ein annar limur verða kallaður inn til viðgerðina og avgerðina í viðkomandi máli.

**Kapittul 5**
**Tagnarskylda**

**§ 12.** Formaðurin, limirnir, skrivstovan og onnur, sum luttaka á fundi í eftirlitinum hava, av umhugsni fyri teimum kannaðu grannskoðanarvirkjunum og teirra viðskiftafólki, tagnarskyldu eftir §§ 152, 152a, 152c-152f í revsilógini, smb. § 17, stk. 2 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Limur kann tó altíð umrøða mál, ið er partur av fundarskránni við ein annan lim, og útflýggja tilfar hesum viðvíkjandi til hansara.
*Stk. 3.* Formaðurin kann í serligum føri avgera, at skrivligt tilfar verður deilt út á fundinum, og síðani latið inn aftur, tá fundurin endar.

**§ 13.** Eftirlitið ger eina árliga frágreiðing um sítt virksemi. Frágreiðingin inniheldur samsvarandi ES tilmæli (2001/256/EF) m.a. úrslitini frá góðskueftirlitinum. Úrslitini kunnu almannakunngerast í hagfrøðiligum líki uttan at tilskila, hvørji grannskoðanarvirkini eru. Frágreiðingin verður eisini almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya - www.skraseting.fo.

**Kapittul 6**
**Gildiskoma**

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið tann 13. januar 2009

**Johan Dahl (sign.)**

landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)